Arne Thorsteinsson:

# Eitt politiskt val

STARV
*Heri á Rógvi*

Fyrrverandi landsantikvarurin, Arne Thorsteinsson, er ikki í iva um, at setanin av nýggja landsantikvarinum er ein politisk setan.

– Hetta er ein politisk setan. Talan er um reinan politikk og einki fakligt. Eg skal ikki ivast í førleikanum hjá landsstýrismanninum sum landsstýrismann, men eg vil so sanniliga ivast í førleikanum hjá landsstýrismanninum sum embætismaður, sigur Arne Thorsteinsson.

Hann grundgevur hetta við, at Annlis Bjarkhamar hevur sett sítt embætisverk til viks, og hetta ivast fyrrverandi landsantikvarurin stórliga í, um landsstýrismaðurin hevur førleika til.

– Eg meti ikki, at hon hevur førleika til at taka dagar ímillum vísindaliga førleikan hjá tveimum umsøkjarum í sambandi við setanina av einum landsantikvari. Hetta er púra óhoyrt, sigur Arne Thorsteinsson.

Sjálvur var Arne Thorsteinsson landsantikvarur frá fyrst í áttatiárunum til ársskifitið 2000-2001.

Hann sigur seg ikki vilja gera metingar um, hvør kanditatur var tann best hóskaði, tí hann hevur ikki verið við í viðgerðinum í málinum, og neyðugt er eisini við tilfari til at gera tílíkar metingar.

– Tað kann fyri sovítt vera líka mikið, hvør er best skikkaður. Tað, sum er avgerandi her, er, at landsstýrismaðurin setir setunarbólkin til viks og tekur eina avgerð, ið hon ikki hevur fakliga førleikan til at taka, sigur Arne Thorsteinsson.

Hetta við politiskum setanum heldur Arne Thorsteinsson vera sera óheppið, og hetta skapar óneyðuga órógv.

– Fólk vita, at hetta er ein politiska setan, og hetta setir Fornminnissavnið í ringt ljós, sigur Arne Thorsteinsson.

Hann roknar við, at verður hetta eitt fyridømi, so kann roknast við fleiri politiskum setanum.

– Vanliga plaga fólk, sum eru politisk sett, at hvørja aftur, tá teirra politiski verji fer úr starvi, sigur Arne Thorsteinsson.



*Fyrrverandi landsantikvarurin, Arne Thorsteinsson, er ikki í iva um, at nýggi landsantikvarurin er settur útfrá politiskum endamálum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

### Ógreitt bræv

Arne Thorsteinsson hevur eisini lisið brævið frá Annlis Bjarkhamar til Símun V. Arge, har greitt verður frá, at hesin ikki verður settur í starv sum landsantikvarur.

– Tann, sum hevur skrivað hetta brævið, veit ikki, hvat innihaldið í starvinum er. Tískil ivis eg í, um tað er landsstýrismaður, sum sjálv hevur viðgjørt hetta málið. Tá má vera onkur annar, men tað er ikki hennara embætisverk, sigur Arne Thorsteinsson.

Fyrrverandi landsantikvarurin heldur málið sum heild vera rættiliga skakandi fyri framtíðina.

### Úr flokkinum

Arne Thorsteinnsson sigur seg vera skakaðan av hesum málinum, at hann vendir Tjóðveldisflokkinum baki.

– Eg havi verið tjóðveldismaður alt mítt lív, men tað eri eg ikki longur. Tað er hesa framtíð, eg ynski fyri Føroyar. Fakliga og vísindaliga arbeiðið á Fornminnissavninum eigur ikki at verða stýrt politiskt á henda hátt, sigur Arne Thorsteinsson.

## Málið

### –í stuttum

Hin 28. september 2002 standa lýsingar í føroyskum og donskum fjølmiðlum, har søkt verður eftir nýggjum landsantikvari. Starvið hevur verið leyst, síðani Arne Thorsteinsson fór úr starvinum um ársskiftið 2001-2002.

Einki óvanligt er við lýsingini. Nevnt verður, at møguligar bygnaðarbroytingar vilja fara fram, men annars er lýsingin rættiliga standard orðað, og Magistarafelagið hevur eisini góðkent lýsingina. Símun V. Arge hevur røkt starvið fyribils. Á t t a umsøkjarar eru til starvið. Samstundis, sum søkt verður eftir landsantikvari, verður eisini søkt eftir landsskjalavørði.

Í báðum førum verða setunarbólkar settir at viðgera umsóknirnar og gera tilmæli til landsstýrismannin, Annlis Bjarkhamar.

Umsóknarfreistin var 11. november 2002, og setunarbólkurin, mannaður við umboðum fyri Mentamálráðið og starvsfólki í Fornminnissavninum, fer beinanvegin undir at viðgera umsóknirnar.

Fyrstu samrøðurnar við umsøkjarar eru 22. november. Bæði Símun V. Arge og Steffen Stumman Hansen eru til samrøåu við setanbólkin. Bólkurin ger eitt tilmæli til landsstýrismannin, har Símun V. Arge verður innstillaður til at fáa starvið. Seinni biðjur Annlis Bjarkhamar sum eina nýggja tilmæling, men úrslitið er tað sama, og aftur hesaferð verður Símun V. Arge settur í starv.

Annlis Bjarkhamar kennir ein iva um tilmælingina og velur sjálv at fara aktivt inn í málið. Hon hevur samrøður við bæði Steffen Stumman Hansen og Símun V. Arge.

Eftir drúgva umhugsunartíð velur hon at seta Steffen Stumman Hansen, sum er útbúgvin mag.art. forsøguligar fornaldarfrøði.

Við hesum setir Annlis Bjarkhamar tilmælingina hjá setunarbólkinum til síðis, og hetta eru fleiri ógvuliga ónøgd.

Uppgávan hjá landsantikvarinum er serliga at vera leiðari fyri Fornminnissavn Føroya og hava ábyrgd fyri øllum arbeiði hjá stovninum.





Símun V. Arge:

# Undrast yvir mannagongd

**Virkandi landsantikvar, Símun V. Arge, sigur seg undrast á mannagongdina í sambandi við setanina av nýggjum landsantikvari. Hóast hann varð innstillaður til starvið tvær ferðir, valdi landsstýrismaðurin annan umsøkjara framum**

STARV
*Heri á Rógvi*

Tvær ferðir var Símun V. Arge til setanarsamrøðu, og tvær ferðir varð Símun V. Arge innstillaður til at fáa starvið sum landsantikvar. Allíkavæl fekk Símun V. Arge ikki starvið, sum hann annars hevur røkt í meira enn eitt ár.

Danin Steffen Stummann Hansen varð settur sum landsantikvar heldur enn Símun V. Arge.

Fyrstu ferð Sìmun V. Arge var til setunarsamrøðu var 22. november 2002. Hann fekk at vita, at tað skuldi ganga ein vika, áðrenn at frætta aftur um starvið, men einki frættist aftur í longri tíð, og hann varð heilt óvæntað kallaður inn til eina nýggja setunarsamrøðu.

Meðan hin fyrra var við sjálvan setunarbólkin, so var hendan seinna við landsstýrismannin, Annlis Bjarkhamar.

– Bæði eg og hann (Steffen Stummann Hansen, blðm.) skuldu til samrøðu aðru ferð. Tað er sera óvanligt at skulu til tvær setunarsamrøðu. Vanliga plagar hetta at vera við setunarbólkin, og eg spurdi eisini eftir, hvar hann var, men eg fekk so at vita, at hann ikki skuldi vera við, sigur Símun V. Arge.

Eftir drúgva umhugsunartíð hevur Annlis Bjarkhamar so gjørt av at seta Steffen Stummann Hansen í starv sum landsantikvar.

### Undrast

Nú tað er greitt, at virkandi landsantikvar ikki heldur fram í starvinum, so undrast hesin mest av øllum.

– Eg undrist yvir mannagongdina í málinum. Tilmælið frá setunarbólkinum og starvsfólkapolitikkurin verða ikki fylgd, og tað undri eg meg yvir, sigur Símun V. Arge.

Spurdur, um hann kennir hesa avgerðina hjá landsstýrismanninum, Annlis Bjarkhamar, sum eina reint politiska avgerð, sigur Símun, at tað kann hann ikki gera stórvegis viðmerkingar til.

– Tá ein landsstýrismaðurin velur at kveistra tilmælið frá setunarbólkinum til viks, so má okkurt liggja undir hesum. Eg má so finna útav, hvør orsøkin er til hetta, sigur Símun V. Arge.

Virkandi landsantikvar sigur sostatt ikki, at Annlis Bjarkhamar hevur havt politiskan vinning fyri eyga, tá hon ikki hevur viljað sett hann í starv.

Símun V. Arge hevur ikki hug at gera aðrar viðmerkingar til málið í løtuni. Hann vísir tó aftur, at orsøkin til, at hann ikki varð settur í starv, skyldast hansara leikluti í málinum viðvíkjandi Kirkjubømúrinum. Hann roknar við, at orsøkin man vera ein onnur.



*Símun V. Arge gjørdist ov stuttur til starvið sum landsantikvarur, hóast ein setunarbólkur fleiri ferðir mælti til, at hann fekk starvið.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

### Royndur

Sjálvur er Símun V. Arge cand. mag í miðaldarfornfrøði. Hann hevur røkt starvið sum fyribils landsantikvar í meira enn eitt ár. Hann er leiðari á fornfrøðideildini á Føroya Fornminnissavni. Hetta starv vendir hann aftur til, tá Steffen Stummann Hansen byrjar í starvinum sum landsantikvar. Símun V. Arge er 52 ára gamal.

Steffen Stummann Hansen er 47 ára gamal. Hann er útbúgvin mag. art. í forsøguligari fornfrøði og hevur gjøgnum vísindaligt virksemi vunnið sær førleika innan miðaldarfornfrøði, stendur at lesa í tíðindaskrivi frá Mentamálaráðnum.

### Meira enn

Hóast hann ikki hevur so nógvar viðmerkingar í løtuni, so er síðsta orðið hjá Símun V. Arge ikki sagt í hesum málinum.

– Eg fari nú at umhugsa støðuna, sigur Símun.

Spurdur, sigur Símun, at tað kann væl hugsast, at málið verður lagt fyri Magistarafelagið, har hann er limur.

## Fakta

**Setanarbólkurin**

Í sambandi við, at søkt varð eftir nýggjum landsantikvari varð settur ein setunarbólkur. Hesin skuldi meta um umsøkjararnar og gera tilmæli til landsstýrismannain útfrá starvslýsingini. Í setunarbólkinum vóru:

Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum
Jóannes Dalsgaard, deildarleiðari í Mentamálaráðnum
Poul Nolsøe, løgfrøðingafulltrúi í Mentamálaráðnum
Andras Mortensen, umboð fyri starvsfólki í Føroya Fornminnissavni.

Hesin bólkur gjørdi í tveimum førum tilmæli til landsstýrismannin, Annlis Bjarkhamar. Báðar ferðir varð hildið, at Símun V. Arge var best skikkaður millum teir átta umsøkjararnar.

Andras Mortensen, limur í setunarbólkinum:

# Tikin av ræði

**– Setanarnevndin varð greitt tikin av ræði av landsstýrismanninum, ið noyðist at hava tikið politisk fyrilit, tá hon ikki vildi fylgja tilmælingini frá setunarbólkinum, sigur Andras Mortensen, starvsfólkaumboð í setanarnevndini**

STARV
*Heri á Rógvi*

Andras Mortensen, søgufrøðingur og Ph.D., var starvsfólkaumboð fyri Føroya Fornminnissavn í setunarbólkinum, sum skuldi geva tilmæli til starvssetanina av nýggjum landsantikvari.

Hann er ørkymlaður um, at landsstýrismaðurin ikki fylgir tilmælinum hjá bólkinum, og hann setir spurnartekin við, hvat endamálið er við einum tílíkum bólki, tá tilmælini ikki verða fylgd.

– Setanarnevndin varð greitt tikin av ræði av landsstýrismanninum, ið noyðist at hava tikið politisk fyrilit, tá hon ikki vildi fylgja tilmælingini frá setunarbólkinum, hon sjálv hevur sett, sigur Andras Mortensen.

Hann sigur seg ikki kunna gera viðmerkingar til sjálva viðgerðina í setunarbólkinum, tí hendan er fevnd av tagnarskyldu.

– Eg dugi ikki at síggja, at hetta kann vera í tráð við setunarpolitikkin hjá landsstýrinum, sigur Andras Mortensen.

Setunarbólkurin viðgerð umsóknirnar til starvið útfrá lýsingini. Setunarbólkurin metir um hvønn umsøkjara og ger tilmæli til landsstýrismannin.

Setunarbólkurin hevði átta umsóknir at taka støðu útfrá. Ì tveimum førum varð greitt tilmælt, at Símun V. Arge skuldi setast í starv sum landsantikvar.

### Fyri felagið

Andras Mortensen fer skjótast gjørligt, at boða Magistarafelagnum frá gongdini í hesum málinum, og hvør handfaringin av málinum hevur verið.

– Eg má venda mær til Magistarafelagið og spyrja, hvussu eg skal fyrihalda mær, tá eg meti, at starvsfólkapolitikkurin hjá landsstýrinum ikki verður fylgdur, sigur Andras Mortensen.

Sjálvur sigur Andras seg hava lítlan og ongan hug at luttaka í líknandi setunarbólki aftur, tá teir á henda hátt kenna seg tikin av ræði.



*Andras Mortensen heldur, at landsstýrismaðurin hevur tikið setunarbólkin av ræði í sambandi við starvssetanina av nýggjum landsantikvari.*